Lesarabrøv

Bygdamenning einaferð enn

Fyri ikki so mongum árum síðan striddust bygdakommununar við okkara løgtingsmenn um skatting av neytum (mjólkarsølu). Tað, ið stríðið snúði seg um, var í høvuðsheitinum tað, at ein maður, ið var komin til pensiónsaldur skuldi kunna hava eina ella tvær kýr uttan at missa av síni pensión.

Tað kundi ikki lata seg gera at fáa broytt, tískil hvarv kúgvin og maðurin sjálvandi eisini, tá nøkur ár vóru liðin. Men tá bæði kúgv og maður vóru burtur, bleiv lógin broytt, hóast ov seint var.

Ullin verður brend, tað var sum í gomlum døgum, tá fólk høvdu eld á heiðini í torvtíð at síggja roykin frá hvørjari rætt í summar, tá menn róku í áseyðaroyting. Lat tað vera, at einki annað er at gera við ullina.

Triðja stórbragdið innan bygdavinnuna, er forboðið um at flyta livandi seyð til stórplássini, har einasti møguleiki er at fáa eitt oyra fyri tað jarðarbrúkið gevur av sær.

Kúgvin er farin. Ullin er brend.

Nú fara vit at reka, tí betur standa fleiri gravkýr frá tí góðu tíðini, tá annarhvør maður var arbeiðsstakari, so ómakurin av at grava avroð, skinn og helst seyðakroppar niður, verður ikki so stórur.

Hendan gongdin kann ikki kallast framburður, heldur »uhyggen bredar sig«.

Hesir menn, ið stíla fyri, hava lært, teir hava lært so leingi, at teir kenna ikki Føroyar aftur, tá teir einaferð fara til arbeiðis.

Palli Dalsgaard

Krabbameinsviðgerð í Føroyum

Sosialurin hevði herfyri samrøðu við Pál Weihe um krabbameinsviðgerð.

Annaðhvørt er hesin Pál Weihe fjákutur ella eisini beistaktigur. Hin triði møguleikin er at viðkomandi grundað á tørvandi arbeiði er settur sum hin fyrsti at skapa trupulleikar innan sjúkrahúsverkið, annað hava vit ikki fingið eyga á til nú.

Fjákutur, tí hesar frásøgnir, sum festar eru í blað javnaðarmanna, eru so langt burturvið, at um hesir gestir hansara úr Danmørkini skiltu føroyskt mál og kundu lesa skriftina, tá vildu teir uttan iva biðið um fyrigeving.

Fyrst ein frágreiðing um at fýra sjúklingar um vikuna verða sendir til Ríkishospitalið. Gud havi lov fyri hendan møguleikan. Næst hesa úttalu ein ábreiðsla, tí tey smærru sjúkrahúsini geva viðgerð, hví er hetta ikki møguligt? Um ikki so skal verða, eru tað tá danskir fyrisitarar og Pál Weihe, ið skulu avgera, hvar hetta fer fram?

Hvaðani hevur arbeiðsmedis. fingið hendan avgerðarrættin?

Føroysku sjúkrahúsini samskipa ikki hendan flutning, sigur hann. Tey gera AVTALUR VIÐ RÍKISHOSPITALIÐ. Stundum er tað so tilvildarligt, at føroyingar noyðast at bíða vikuvís í Keypmannahavn, áðrenn tey sleppa framat.

Er nakar her á landi so fjákutur, at viðkomandi trýr, at um avtalan er við Havnarsjúkrahúsið, tá er ongin biðitíð? Er hetta ein beinleiðis ábreiðsla mótvegis fyristøðukvinnum við smærri sjúkrahúsini, at hesi ikki evna at tosa danskt, og tá gera avtalu av misgáum?

Ella er hetta ein vinagerð, at hesir sjúklingar fáa nakrar dagar til klimatisering í stórbýnum, áðrenn viðgerðin fer fram? Hetta verður tá teimum væl unt, fleirfald betur enn sum skemtiferðing embætismanna.

Sagt verður, at Føroyar eru ov smáar til at viðgerðin fer fram á trimum støðum.

Helst er ongin í iva um, at tað er mark fyri hvørja viðgerð vit røkka á hesum øki, og stórur er spurningurin, um ikki hendan viðgerð eisini átti at verðið løgd út til primersektorin, tí talan er einans um kemoterapiviðgerð.

Ein Birte Høj skal hava sagt, at sjúklingarnir mugu kenna á sær, at teir eru í tryggum og serkønum hondum.

Hvør borgar fyri serkunnleika uttan Ríkishospitalið?

Hvør avger, hvar sjúklingurin følir seg tryggast á okkara sjúkrahúsum? (Pál Veihe, kanska).

Ein annar Høj skal hava sagt, at tá teir tosa við føroyingar um at fáa sjúkling niður, verður sjáldan tosað við sama persón. Við hesum verður roynt at siga frá, at tað er betur at tosa við trý frá einum sjúkrahúsi enn eitt frá hvørjum.

Tori at pástanda, at annaðhvørt er hetta barnslig endurgeving, ella eisini ein loddrøtt lygn.

Fyri at undirbyggja tørvin á hotelldrift við verður nú samlað saman í hóp, so vit kunnu senda eitt cancerflogfar niður 14. hvønn dag.

Lat tað verða sagt tykkum, sum fyriskipa sjúkrahús okkara, at her er talan um at taka burtur tey rættindi, sum sjúkrahúsini hava fingið lógfest í síni tíð grundað á, at hendan ætlan hesin arb. medis. her ger seg til talsmann fyri, áður hevur verið reglan fyri føroyska sjúklingin. Ein regla, ið royndist so av leið illa, at hon ikki er umtalu verd. Úrslitini av slíkari skipan vóru so av lagi vánalig, at hetta má ikki bjóðast føroyska sjúklinginum aftur.

Tað var tí heldur ikki av tilvild, at hetta mátti lógfestast, trúgvið tí.

Næsta vitjanin av fyrisitingarfólki frá Ríkishospitalinum verður helst frá skurðdeildunum.

Setningurin er tá rokkin, at fáa fólk í rætt, tá tað ikki eydnaðist við visitatiónsnevndini.

Kundi eg at enda spurt tykkum, javnaðarmenn? Hvar hoyrir hesin arbeiðsmedisinarin heima í okkara sjúkrahússkipan? Er hesin ikki neyðugur til arbeiðsmedisinsku uppgávuna, takið tá fylgjurnar av hesum mistaki, at hesin varð settur, so tit fáa arbeiðsfrið við sjúkrahúsini.

Asbjørn Joensen

Tryggingarvirksemi

Altíð tá tú skal fáa nakað frá tryggingini, so er tað ein politiskur spurningur. Soleiðis eisini hesa ferð. Í svari frá Árna Rein sigur hann, at vit áttu at umhugsað eina skipan, sum kundi stuðlað eftirsitandi peningaliga. Tað haldi eg vera sera løgið, tí tá tað kemur til at brúka pening hjá Tryggingarsambandi Føroya til scannara til Landssjúkrahúsið og til føðingardagsgávu til starvsfólkið, tá geva teir sum tað passar teimum.

Eg fari ikki at takka Tryggingarsambandi Føroya fyri scannaran, teir góvu Landssjúkrahúsinum, tí tað er ikki teirra peningur, sum verður nýttur til tað, men peningur, sum tilkemur øðrum. At keypa útgerð til Landssjúkrahúsið má vera ein uppgáva hjá landsins ráðandi myndugleikum ella um tað var eitt privatfólk, sum gav scannaran, so var søgan ein heilt onnur. So kundi eisini eg sagt takk fyri.

Eg heiti á landsins myndugleikar at seta hol á tryggingarmonopolið. Árni Rein sigur, at eg eins og nógv onnur haldi, at um monopoliið verður avtikið, so verður alt so nógv betri. Sjálvur sigur hann seg seta eitt stórt spurnartekin við tað. Tað skilji eg so væl, tí hann hevur bara arbeitt undir monopoli, og kann tí ikki ímynda sær nakað annað, men sjálv haldi eg, at tað bara kann verða betur, um vit fáa kapping. Eg spurdi eisini um mína eftirlønartrygging, sum eg gjaldi 591,12 kr. fyri um mánaðin — hvussu heldur hon! Heldur hon ikki út um deyðu grøv, so er einki høpi í at hava slíka trygging. Tann spurningin vil eg fegin hava svaraðan.

So ein spurning til Tryggingarsamband Føroya. Hvat ætla tit við Hotel Borg. Hvussu nógvan pening settu tit í hotellið av fyrstan tíð? Mín hugsan er, at tann peningur var betur nýttur aðrastaðni, t.d. í ein grunn, sum kundi verðið til hjálp hjá øllum teimum, sum missa forsyrgjarar (av sjúku), tí sambært Árna Rein eru øll, sum doyggja av vanlukku, væl tryggjað, hóast mín meining er ein heilt onnur um tann spurningin. Har verða vit ongantíð á einum máli. At eg havi tikið til orðanna í hesum máli, er tí eg veit, at tey, sum verða rakt av vanlukku og føla seg at vera fyri vanbýti í samfelag okkara, ikki orka tað sjálvi og tí illa orka at hyggj aftur um tað svarta skrædlið fyri framman.

Klaksvík 9.9.1991

Olanta Hansen

Heimið er tað besta stað á jørð:

Hvat er eitt heim?

Hóskvøldið kl. 19.30 verður almennur fundur í KFUM í Havn við evninum "Hvat er eitt heim".

Hvat er tað, sum skapar eitt heim? Hvussu eigur eitt heim at vera? Hvussu ávirka broytingar í samfelagnum tað einstaka heimið? Og hvussu eigur tað "rætta" heimið at vera?

Á fundinum verður nomið við hesar og aðrar spurningar. Høvi verður hjá fundarfólkinum at seta spurningar og gera viðmerkingar.

Arni Ludvig, skúlastjóri, leggur fyri.

Hetta er fyrsti fundur við temanum "Heimið er tað besta stað á jørð". Aðrir fundir verða seinni í heyst og í vetur við sama tema.

3 kømur til leigu

Millum Gilja eru trý kømur við atgongd til køk og bað til leigu fyri 1500 kr. hvørt, til edrúilig fólk.

Kømrini kunnu eisini leigast sum íbúð.

Tlf. 19890 seinnapart

sosialurin

Fráboðan um góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at landsstýrið við heimild í § 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, hevur góðkent Handskavirkið á Húsum v/ Sólarn Isaksen.

Føroya Landsstýri
09.09.1991

sosialurin

Ráðgeving

er í Kvinnuhúsinum hvønn hósdag frá kl. 19 til 21.